

# Starvsfólk til Radiodeildina á FT-Net.

FT Net rekur fjarskiftisnetið hjá Føroya Tele, og fevnir hetta um kaðalnetið, luftborna netið, transmissión og bygningar. Uppgávan er m.a. at tryggja, at allir veitarar fáa somu atgongd til netið. Arbeiðsuppgávurnar hjá starvsfólkunum í FT Net eru at reka og menna netið og selja nettænastur til allar veitarar undir somu treytum.

Vilt tú verða við til eina spennandi og avbjóðandi menning av tráðleysu fjarskiftistøknini í Føroyum, so hevur Radiodeildin á FT-Net brúk fyri tær.

**Starvslýsing**
Tú verður við til at menna og reka tráðleysar skipanir í tøttum samstarvi við starvsfelagar. Arbeiðið fevnur um alt slag av tráðleysum skipanum, so sum:

- Fartelefonkervi (GSM)
- Tráðleysar Ethernet/TCP/IP skipanir (WiMAX, WiFi)
- Backbone radiolinkar
- Sjónvarps og útvarpssendinet
- Mastra- og antennuanlegg

Arbeitt verður út frá høvuðssætinum hjá Føroya Tele í Hoyvík, og arbeiðið fevnur um alt landið

**Hvat kunnu vit bjóða tær**
Tú kemur at arbeiða í einum umhvørvi við nógvum spennandi tekniskum uppgávum, har tú hevur møguleikan at menna teg teknist og persónligt. Sum nakað heilt serligt, kemur tú at hava møguleikan at arbeiða við hátøkniligum uppgávum, samstundis sum tú hevur møguleikan at ganga úti í náttúruni, við tað at nógv útgerð hjá FT-Net stendur víða um í landinum - í bygdum øki sum í haga.

**Førleikakrøv**
Vit vænta at tú:

- Ert ágrýtin og hevur stóran áhuga fyri teknikki og at menna teg tekniskt
- Ert sjálvstøðug/-ur og samstundis er før/-ur fyri at loysa trupulleikar í tøttum samstarvi við onnur
- Lætt finnur tekniskar loysnir og setir teg inn í tekniskar spurningar
- Dugir væl at arbeiða við teldum og telduforritum í Windows
- Hevur kunnleika til ethernet/IP netverk
- Ert raskur/røsk til likamligt arbeiði, sum t.d. at ganga í haganum, tá farið verður at arbeiða í radiosmáttunum og arbeitt verður í mastrum
- Hevur tekniska útbúgving sum t.d. elektronikkmekanikari, elektronikkteknikari ella diplom verkfrøðingur

Starvið verður sett í august/september. Starvið verður lønt sambært avvarandi sáttmála.

Nærri fæst at vita við at venda sær til Jóhan Poulsen, tel 243649 ella Starvsfólkadeildin á tel 303030.

Umsókn við avritum av prógvum og ummælum skal verða Føroya Tele í hendi í seinasta lagi 26. juli 2007 og skal stílast til:

Føroya Tele
Starvsfólkadeildin
Postsmoga 27
110 Tórshavn

ella sendast við t-posti til ft@ft.fo

ft•net

---

# verð Fangavørður





*Tak eina fjøltáttaða útbúgving uppá trý ár. Tú fært løn og ábyrgd frá fyrsta degi. Hygg inn á www.kuc.dk. Har sært tú hvat vit krevja av tær.*
*- ein samfelagsgagnlig uppgáva*

## Fakta

Undirvíst verður í: at steðga ósemjum, ítrótti, sálarfrøði, pedagogikki, samfelagsfrøði, sosiallæru, revsi- og fyrisitingarrætti, og í ymiskum øðrum viðkomandi lærugreinum. Undirvísingin er fevnd av teori í átta mánaðir, í Lunde á Fyn og í Birkerød á Sælandi. Praktiska venjingin verður í einum fongsli ella í einum arresthúsi.

Vit krevja av tær, at tú stendur kropsligar og teoretiskar royndir.

Vit leggja dent á tolsemi, virðing fyri øðrum, eitt gott sinnalag, ábyrgdarkenslu, at tú ert búgvin, góð samstarvsevni, og at tú dugir føroyskt, danskt og í minsta lagi eitt fremmant mál.

KRIMINAL FORSORGEN

*Umsóknir latast inn í seinasta lagið mánadagin tann 23. juli 2007 til:*

*Arresthúsið í Tórshavn*
*Bókbindaragøta 1*
*100 Tórshavn*

*Ringjast kann til okkara um nærri kunning á tel 31 73 40*

Umsóknarbløð og upplýsingar fáast frá: www.kuc.dk • www.kriminalforsorgen.dk

DIMMALÆTTING